


**Frá 1. des. og fram til Jóla lata vit 25 % av øllum vørum í handlinum, tó undantikið slikk, sodavatn og sigarettir**

## Stórt úrval av leikum og jólapynti!

**Her finnur tú altíð røttu gávuna!**

sp/f O.K. HEILSØLA & MASKINUR

430 HVALVÍK · TEL 42 23 94




# Leiðari til Svimjihøllina

Søkt verður eftir leiðara til Svimjihøllina í Gundadali.

**Svimjihøllin í Gundadali**
læt upp í 1982. Høllin hevur fýra hyljar, tveir barnahyljar, ein 25 metra hyl og ein kavingarhyl, umframt gosbað, hitarúm og sólir. Í høllini er kaffistova, sum er opin, tá almenn svimjing er. Talið á vitjandi er í miðal 450-500 um dagin, tó munandi fleiri um summarið, tá høllin er opin allan dagin, millum 650 og 800 fólk. Árliga hevur høllin eini 150.000 vitjandi. Í svimjihøllini eru 12 fólk í føstum starvi og átta fólk í føstum avloysarastarvi, og í kaffistovuni arbeiða tvey fólk.

Kommunan bjóðar eitt áhugavert starv við fjølbroyttum og mennandi uppgávum og avbjóðingum, har møguleiki er at skapa nýggj tilboð til viðskiftafólk í høllini.

**Nakrar av høvuðsuppgávunum eru:**
- at standa fyri øllum rakstri av svimjihøllini og viðlíkahaldi innan og uttan
- at hava ábyrgd av dagliga virkseminum, m.a. mótvegis starvsfólkum og viðskiftafólkum, tekniskt og fíggjarliga
- at tryggja eitt trygt, reint og dámligt umhvørvi í svimjihøllini
- at fylgja við og kunna seg um menning á økinum

**Førleikakrøv**
- Umsøkjari skal hava viðkomandi útbúgving og kunnleika til økið. Teknisk útbúgving og/ella hóskandi royndir/vitan kann geva fyrimun, vísandi til at nógv teknisk útgerð og skipanir eru í svimjihøllini
- Royndir innan leiðslu og samstarv

**Persónligir eginleikar**
Umráðandi er, at viðkomandi er fyrikomandi og dugir væl at samskifta bæði innan- og uttanhýsis, og kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar. Neyðugt er at hava hugsjónir um virksemið í høllini og kunna ganga á odda.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er eitt fulltíðarstarv og verður sett skjótast til ber. Løn sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

Leiðarin í Svimjihøllini hevur tilvísing til mentamálaleiðaran.

**Meira fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jákup Simonsen, mentamálaleiðara, ella Ingibjørg Berg, trivnaðarstjóra, telefon 30 20 10.

**Umsóknir**
saman við upplýsingum um útbúgving og royndir skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, Postrúm 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 15. desember 2008.

**Tórshavnar kommuna**